## Real dyrgir í Liverpool

Nógv hevur verið tosað um, at Real Madrid vildi keypa Cristiano Ronaldo, men nú skrivar blaðið AS, at Real er farið at dyrgja í Liverpool. Tað er miðvallarspælarin Xabi Alonso, sum hevur vakt áhuga í kongaliga spanska felagnum. Sambært AS skal Real Madrid verða sinnað at gjalda næstn 200 milliónir krónur fyri spælaran, men Liverpool sigur seg als ikki verða sinnað at selja.



## Ajax vil hava Morten Olsen

Niðurlendska felagið Ajax er áhugað í at fáa danan Morten Olsen til venjara. Morten Olsen er annars venjari hjá danska landsliðnum og er sáttmálabundin hesa undankappingina afturat.

- Eg kann vátta, at vit eru áhugaðir í Morten Olsen, men aðrir venjarar eru eisini upp á tal, og í løtuni royna vit at seta saman ein lista við evnum, sgiru Riske Betten, talsmaður hjá Ajax, við BT.

B36-B68 0-2 (0-0):

# Toftamenn ruddaðu Gundadal

**Tað var eingin sum helst ivi um, at B68 skuldi hava alt við sær úr Gundadali í gjár. Og eftir tvey tap á rað er B36 um at vera heilt úti úr oddastríðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B68 staðfesti í Gundadali, at teir eru um at verða til reiðar at bjóða toppinum í Vodafonedeildini av.

Seinasta vikuskifti hildu toftamenn seg eiga betur uppiborið enn javnleikin í Gøtu, men leikliga er einki at ivast í, at sjálvsálitið er kvinkað rætta vegin, og tað var fyri tað nógva eitt lið í góðari javnvág, sum var á vitjan hjá B36.

### Gestirnir vandamiklari

Styrkin hjá B36 hevur í ár verið, at liðið hevur vart væl, fyri síðani at seta ferðina nógv upp í mótálopunum.

Men tann uppskriftin riggaði sjáldan sunnudagin. Partvíst hevur B68 í Nenad og Ndende kanska sterkasta sentrala miðvøllin í landinum, og tí var sjáldan, at óneyðugir bóltmissir góvu B36 møguleika at fremja kviku mótálopini. Og partvíst tóktist B36 bara ikki hava dagin, har tingini á vøllinum vildu eydnast á rættan hátt.

Soleiðis hevði B36 bara tvær veruliga roynir á toftamálið fyrstu trý korterini. Men fyrru ferðina varð stútari frá Sam Malson ruddaður á málstrikuni, og í hinum førinum vardi Vlada Filipovic væl fyri, tá Róaldur Jacobsen royndi seg úr spískum.

Í hinum endanum var tó fleiri ferðir vandi á ferð. Í tveimum førum stórbjargaði Tróndur Vatnhamar royndir frá Ndende, og somuleiðis vardi málverjin sera væl fyri tveimum royndum, sum Keita hevði.

Og umframt beinleiðis vandamiklu royndirnar, so hevði B68 eisini fleiri støður, har veruliga opni møguleikin bara var eina avlevering burturi.

### Perla frá Óla

Toftamenn máttu tó bíða, til ein lítil løta var farin av seinna hálvleiki, áðrenn teir veruliga sluppu at fegnast.

Men tá málið so kom, var tað ein sonn perla. Óli Olsen vann luftbólt, og eftir at hava latið bóltin hoppað eina ferð, hálvfluktaði hann við vinstra fóti upp í málhornið úr góðum 20 metrum.

Málið gav B68 fullkomuliga tamarhald á. Nenad hevði gjøgnum dystin stýrt leikferðini, og nú tók hann fótin av speedaranum, uttan at B36 á nakran hátt fekk svarað aftur. Og lættari gjørdist tað ikki, tá Herbert í Lon aftur helt Keita somikið væl, at dómarin fyri aðru ferð gav honum gult kort og harvið reytt.

Hetta tók mest sum alla luftina úr B36, og tá Ndende so skoraði eftir hornaspark, var tað »game over« fyri B36.



*Toftamenn vóru omaná í at kalla øllum lutum, tá teir í gjár vunnu ein sannførandi sigur á B36 í Gundadali*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Toppdystur á Svangaskarði

Tað er tað helst eisini í oddastríðnum hjá B36, sum nú hevur tapt tvær ferðir á rað á heimavølli. Tað tóktist annars lovandi, tá teir í fyrstu tveimum av teimum á pappírinum heilt truplu dystunum spældu javnt, men tapini móti NSÍ og B68 hava prógvað, at hóast B36 kann órógva alt og øll á einum góðum degi, so megnar liðið ikki nóg væl at halda eitt javnt høgt støði.

Toftamenn eru nú á sama stigatali sum B36. Men formkurvan hjá teimum peikar hinvegin beint í loft í løtuni. Við bæði Ndende og Nenad í fullari dystarvenjing hevur B68 eisini ein miðvøll, sum stendur øllum kurl. Og við tveimum áleyparum, sum einsamallir kunnu skapa nógv, mugu teir í dag roknast sum ein somikið stórur vandi móti øllum liðum, at tað als ikki skal koma óvart á, um Svangaskarð seinni í ár verður karmur um okkurt, sum av álvara líkist oddadysti.

## Beinini á jørðini

Hóast sigurin og ikki minst spælið hjá B68 gav góð lyfti um komandi vikurnar, so vildi liðskiparin hjá gestunum í Gundadali ikki hoyra talan um heiðursmerki ella líknandi.

– Eg haldi, at talan var um ein góðan dyst í dag. Bæði liðini royndu at skapa sær møguleikar, og fyri steðgin gekk hampuliga javnt á. Men vit klára fyri tað nógva at halda teimum burtur frá teimum heilt vandamiklu støðunum, og tá vit so skora, haldi eg, at vit hava tamarhald á, segði Jóhan Dávur Højgaard.

Tit endaðu væl í kappingarárinum í fjør, og longu nú tykjast tit hava funnið sama stevið. Hvussu langt kann B68 røkka í ár?

– Tað veit eg ikki. Top-5 vildi eg í øllum førum hildið, staðfesti ein kanska lítillátin liðskipari.

**-mørk**

## Ikki oddalið

Jákup á Borg hjá B36 helt eftir dystin í gjár, at hann og B36 ikki høvdu so øgiliga nógv at siga um kalda veruleikan, sum staðfesti, at B68 fór avstað við trimum stigum.

– Fyri steðgin haldi eg, at tað gongur rímuliga javnt á, men vit verða sjáldan nóg vandamiklir. Og eftir at teir skora, megna vit ongan tíð veruliga at hótta teir.

Tit hava nú tapt tvær ferðir á rað. Var hetta tykkara farvæl til oddastríðið?

– Tað kanst tú sjálvandi siga. Men hinvegin hevur okkara málsetningur ikki verið at verið partur av hesum. Tað hevur gingið væl í eina tíð, men vit hava ikki viljað lagt okkum sjálvar undir nakað trýst. So fyrst og fremst ræður um hjá okkum at arbeiða hart, segði Jákup á Borg.

**-mørk**